# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Dagurin

**16. oktober. Gallus,** deyður í 640. Írskur munkur, sum læt kleystrið St. Gallen við Bodenvatnið byggja. Doyði 95 ára gamal.

**17. oktober. Florentinus,** deyður umleið 1525. Biskupur í orange í Fraklandi; kendur úr søguni av fleiri kirkjufundum, har hann hevur verið við, men annars vit teir einki um hann at siga.

*Mikkjal á Ryggi varð føddur hendan dagin í 1879.*

**18. oktober. Lukas**. Evangelistur og ápostlasøguskrivari. Halgisøgan sigur, at hann eisini var listamálari og málaði eina mynd av Mariu Moy. Eisini verður sagt, at hann doyði friðarliga 84 ára gamal.

Navnið er grikst og merkir *maður úr Suðuritaliu.*

## Gullbrúdleyp

Leygardagin 16. oktober hava hjúnini Arnljót og Leif Pedersen í Syðrugøtu verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin á Muntra í Fuglafirði fyri innboðin.

## Silvurbrúdleyp

17. oktober kunnu hjúnini Lina Frawley av Reyni og Jens av Reyni Tórshavn halda silvurbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

## Brúdleyp

Í dag, 16. oktober, kl. 16.00 giftast í Fríðrikskirkjuni Randi Gleðisheygg, Nes, og Fabian Franco, Gibraltar. Brúdleypsadr.: Svangaskarð.

Minningarorð um

## Gunleyg Joensen

### úr Nólsoy

**deyð 16. januar 2004**



Tað vardi meg ikki, tá vit frættu at Gunleyg var farin, at tað skuldi ganga so skjótt, frá tí at hon bleiv sjúk, til hon slóknaði.

Vit komu at kennast á ungum árum, tá ið vit báðar komu at arbeiða í sama handli í Havn.

Skjótt sást, at tú var eitt gávuríkt og álítandi fólk. Tá ið vit so seinni giftust og fóru hvør sína leið, tá var tað bara av og á at vit hittust í býnum, so fingu vit prátað saman um mangt og hvat.

Fyri fáum árum síðan kom tú í Pensionistafelagið í Havn, og ikki gekk long tíð, til tú bleiv vald í nevnd. Hetta arbeiði sum nevndarlimur gekk tú høgt upp í og gjørdi títt arbeiði til lítar. Tú var altíð fús at taka hond í, hvat tað so skuldi verið.

Góða Gunleyg, vit sakna teg nógv og títt altíð blíða smíl. Vit gloyma ikki túrin, sum tú skipaði fyri til Nólsoyar. Tú hevði lagt alt so væl til rættis.

Vit ótu døgurða í "Royndarhúsinum", og best sum vit sita og eta, brestur ódnarveður á, so "Ternan" ikki kundi koma eftir okkum. Men tú hevði í tínum stilla sinni gingið og syrgt fyri, at øll fingu innivist. Og takk skal tú hava og allir nólsoyingar, sum tóku so væl ímóti okkum øllum.

Vit vilja við hesum minnast teg í takksemi fyri tíðina vit vóru saman í Pensionistafelagnum.

**P.A.**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt gjørdu jarnbrúdleypsdag okkara 7.10. sera hugnaligan.
Ein serstøk tøkk til leiðaran og starvsfólkið á Røktar- og ellisheiminum í Runavík fyri tað stóra arbeiði, tit gjørdu fyri at heiðra okkum henda dag.

**Alfrida og Andreas Hammer**
**Runavík**

# Tøkk

Hjartans tøkk til øll sum mintust meg á áttatiára degnum við gávum, blómum, fjarritum og telefonuppringingum og tykkum sum komu inn á gólvið.

Blíðar heilsanir
**Bjarni Dal-Christiansen**

# Fløvandi gáva til Beitishúsini

**Vága Dansifelag hevur fingið ein kekk frá Lions Club Vágar, sum fer til at gjalda fyri alt hitaverkið í Beitishúsunum**

PENGAGÁVA



*Arnjohn Hvítklett, forseti i Lions Club Vágar, handar Hervør Jørgensen, umboðandi Beitisnevndina hjá Vága Dansifelg, kekkin, sum fíggjar hitaverkið í felagshúsinum hjá Dansifelagnum*

Lions Club Vágar hevur latið Vága Dansifelg ein kekk áljóðandi kr. 32.000,- at brúka til sentralhitan í Beitishúsinum, sum eru felagshúsini hjá Dansifelagnum.

Arbeitt hevur verið í nøkur ár við at seta i stand húsini í Beitinum í Miðvági, sum Vága Dansifelag eigur. Húsini eru barnaheim Mikkjals á Ryggi.

Sunnudagin eru liðin 125 ár, síðan Mikkjal á Ryggi varð borin í heim í Beitinum, fer Vága Dansifelag at hava fyrsta tiltakið í Beitishúsinum.

Tiltakið verður eitt hátíðarhald við verkum hjá Mikkjali á Ryggi. Byrjað verður í Miðvágs Kirkju sunnudagin 17. oktober klokkan 16.00 seinnapartin, og hildið verður fram í Beitishúsunum, tá kirkjuligi parturin av skránni er liðugur.

Vága Dansifelag hevur eina serstaka Beitisnevnd, sum hevur til uppgávu at standa fyri tí arbeiði, sum gjørt verður við húsini. Tíggju ár eru síðan, Dansifelagið fekk húsini, og arbeitt hevur verið í smáum. Í ár hevur meira ferð verið á arbeiðinum, og felagið hevur fingið so mikið góðan stuðul til arbeiðið, at fyrsta tiltakið nú kann haldast í húsinum, hóast tey ikki eru liðug.

**ej**





*Fólkatingslimurin hjá Radikala Vinstra, Naser Khader, umhugsar saman við Kamal Qureshi at leggja trýst á føroyingar fyri at broyta føroysku fosturtøkulógina*

Fosturtøkuforboðið á breddan í Danmark:

# Qureshi og Khader umhugsa at leggja trýst á føroyingar

**Fólkatingslimirnir, Naser Khader og Kamal Qureshi umhugsa at leggja politiskt trýst á føroyingar fyri at broyta føroysku fosturtøkulógina. – Eg vil ikki nýta orðið tvang, men vit eiga at nýta tey politisk amboð, vit hava, sigur Naser Khader við Politiken**

FRÍ FOSTURTØKA

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Vit svíkja fullkomiliga føroysku kvinnurnar í løtuni. Eg kann ikki skilja, hvussu vit innan ríkisfelagsskapin hava ein bólk av kvinnum, sum verða noyddar at vera við barn, tá tær ikki ynskja tað, sigur framsøgumaðurin í javnstøðumálum hjá SF, Kamal Qureshi.

Átakið hjá fólkatingsliminum, Kamal Qureshi, og felagnum Kvindeligt Selskab hevur veruliga sett ferð á kjakið aftur um fosturtøku í Føroyum, og nú eru danskir politikarar farnir at gera vart við sína støðu í málinum.

Danska dagblaðið, Politiken, skrivar í dag, at danskir politikarar eru ójavnir á máli um Danmark eigur at leggja trýst á Føroyar í spurninginum um fría fosturtøku ella um danir skulu halda seg frá at leggja seg upp í føroysk viðurskifti.

Fólkatingslimurin hjá Radikala Vinstra, Naser Khader sigur við Politiken, at hann er samdur við Kamal Qureshi um at danir eiga at virka fyri, at fosturtøkulógin í Føroyum verður broytt.

– Eg vil ikki nýta orðið tvang, men vit eiga at nýta tey politisk amboð, vit hava. Men eg havi skilt, at vit hava ikki eina siðvenju fyri, at vit ikki blanda okkum í føroysk viðurskifti, sigur Naser Khader við Politiken.

Framsøgumaðurin hjá stjórnarflokkinum Vinstra í javnstøðumálum, Troels Lund Poulsen, heldur, at Danmark skal bert gera vart við seg um tað kemur eitt politiskt trýst úr Føroyum.

– Hvar gongur markið fyri, hvar vit kunnu blanda okkum, spyr Troels Lund Poulsen.

## Haldið tykkum burtur

Politiken hevur eisini fingið orðið á Annitu á Fríðriksmørk, sum sigur seg stuðla fríari fosturtøku í Føroyum. Tjóðveldistingkvinnan slær kortini fast, at hon heldur, at danir ikki skulu blanda seg í føroysk viðurskifti.

– Eg haldi ikki, at onnur skulu gera av, hvussu okkara lóggáva skal vera, sigur Annita á Fríðriksmørk við Politiken.

Føroyska lóggávan á fosturtøkuøkinum er ein gomul donsku lóg frá 1956, og Politiken skrivar, at danski lógmálaráðharrin, Lene Espersen, hevur tí heimild í løtuni at broyta lógini, men hesum sýtti hon fyri góðum hálvum ári síðan, tá Naser Khader reisti spuringin á Fólkatingi.

## FAKTA

Føroyar, Portugal, Spania, Kypris og Pólland loyva bert fosturtøku um lívið ella heilsan hjá mammuni ella banrinum er í vanda ella talan er um eina neyðtøku ella siðamisbrot

Hetta er eisini galdandi í Luksemburg. Kortini kunnu læknar í Luksemburg nokta at fremja fosturtøku. Av teirri orsøk fara fleiri kvinnur til Belgia ella Holland fyri at fáa fosturtøku

Írland loyvir bert fosturtøku, um lívið hjá mammuni er í vanda

Malta loyvir als ikki fosturtøku

Í Danmark varð fosturtøka lóglig í 1973. Hvørt ár verða millum 15.000 og 20.000 fosturtøkur framdar. Talið av fosturtøkum hevur verið fallandi seinnu árini

*Kelda: Politiken*